## Fram tók bronsuna

Undan brakinum um Havnina millum Fleyr og Fram í meistaradeildini hjá monnum var Fram fýra stig frammanfyri Fleyr við bert tveimum dystum eftir at leika.
Fleyr megnaði tó ikki at halda fast um bronsumøguleikan.. Fram vann dystin 3-1 við settúrslitunum 15-25, 25-20, 23-25, 21-25.

## KÍF fór fram við TB

Undan dystinum í Trongisvági sunnudagin millum bestu kvinnuliðini hjá TB og KÍF í flogbólti lógu liðini jøvn í stigum á fjórða plássi. KÍF hevur tó havt betri gongdina seinastu tíðina. Og tær megnaðu eisini at halda fast um hetta við einum 3-1 sigri. Settúrslitini vóru 21-25, 19-25, 26-24, 23-25. Við sigrinum eru tær nú farnar fram við TB á stigatalvuni, og nú er KÍF einsamalt á fjórða plássi.

# Vit trúgva upp á gullið



Mynd: Janus Einar

Dagsins maður hjá Kyndli sunnudagin var uttan iva Janus Einar Sørensen. Hóast hann ikki vildi gera so stóran háva burtur úr sínum avriki eftir dystin, so duldi hann ikki fyri, at tað í løtuni gongur væl hjá Kyndli. Einum liði, sum mong nú síggja sum ein av favorittunum til at vinna FM-finaluna. Eisini hóast liðið enn ikki hevur spælt seg í hana.

- Tað er so avgjørt tað, sum vit fara eftir, og tað hevur gingið væl seinastu tíðina. Hóast alt sjálvandi kann betrast, so hava vit verið rættiliga stabilir í endaspælinum. Síðani vit taptu fyrsta dystin í hesum, hava vit ikki tapt, og formkurvan hevur avgjørt eisini vent rætta vegin, sigur Janus Einar sjálvur.

Um orsøkin til hetta heldur Janus Einar, at tað í stóran mun er hátturin, sum spælararnir saman við venjaranum hava duga at tackla støðuna.

- Fyrst og fremst, so hava vit duga væl at tikið eina uppgávu ísenn. Hóast tað bert eru tríggir dystir eftir av endaspælinum, so kennis hetta nærum sum eitt marathon, tí einki lið kann kenna seg trygt. Tað hevur kanska eisini gjørt, at vit ikki hava torað at hgusa ov langt fram, men heldur hava tikið hvørja uppgávu sær.

- Og við góðu úrslitunum haldi eg eisini, at sjálvsálitið er komið. Sjálvur ivist eg so ikki í, at tá vit spæla okkara besta, eru vit besta lið í landinum. Sjálvandi skal ein og hvør spælari siga tað, men tað er veruliga kenslan, sum vit nú hava. Og við hesum kemur eisini yvirskotið at vísa og siga hinum liðum, at vit eru bestir. Og skal eg vera heilt erligur, so haldi eg eisini, at tann parturin ofta hevur fingið mótstøðuna at øtast eitt sindur.

- Eisini tí vit hava eitt gott lið. Vit hava royndar spælarar, sum kunnu taka ábyrgd, og vit hava fleiri ungar spælarar, sum veruliga hava ment seg, tí venjarin sýnir teimum álit, sigur Janus Einar.

Men enn vilja hvørki hann ella Kyndil taka nakað fyri givið. Munurin aftur til triða plássið er bara ein dystur, og tí eru ráðini ikki at tapa nakað sum helst. Serstakliga ikki í teimum báðum komandi dystunum, sum eru móti júst nummar trý og fýra á talvuni.

*-mørk*

H71-StÍF 21-26 (12-16):

# StÍF aftur á beint

**Efitr trý tap á rað í landskappingini, helst StÍF fast í finaluvónini, tá teir vunnu útidystin móti H71**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tykist, sum hava hoyvíkingar givið upp alla vón um at fáa sær nøkur líkinda úrslit nú móti kappingarenda. Í endaspælinum er liðið stútt og støðugt dalað á talvuni, har teir nú eru púrasta avbyrgdir í botninum.

Tí var høvið tað rætta, tá StÍF skuldi hava sína skútu á beint. Steypavinnararnir høvdu annars tapt tríggjar landskappingardystir á rað, soleiðis at Kyndil nú var farið fram við í stríðnum um at røkka øðrum finalupláss-inum.

Sunnudagin var talan kanska ikki um besta StÍF-avrikið á árinum, men longu fyri steðgin stóð greitt, at hetta kortini skuldi verða nóg mikið. Uttan at teir nakran tíð veruliga toppaðu, megnaðu gestirnir at byggja sær eina hampuliga leiðslu, sum teir ongan tíð tóktust hava ætlanir at sleppa.

Fyrstu løtuna eftir steðgin varð leiðslan økt upp í seks mál, og restina av dystinum tóktist spurningurin bara vera, hvussu nógv mál sigurin skuldi gerast. Nærri enn fýra málum komu hoyvíkingarnir ongantíð, og tí kundu teir illa mótmæla stórvegis móti tølunum, tá dómarararnir høvdu bríkslað seinasta bríkslið.



*Sveinur Justinussen er spakuliga við at spæla seg í dystarvenjing, og hann kann vera trumfurin, sum fær StÍF seinasta pettið móti finaluni*
*Mynd: Álvur*

**FAKTA**

**H71-StÍF 21-26 (12-16)**
Málskjúttar
**H71:** Niels Viggo Niclassen 4(1), Janus Sørensen 3, Bjarni Sørensen 3, Tróndur Vatnhamar 3,t Freddy Poulsen 3, Poul Kjartan Dam 2, Esbern Patursson 2(1), Gunnar Bláberg 1
**StÍF:** Sveinur Justinussen 5, Finnur Hansson 5, Leivur Justinussen 5(4), André F. Danielsen 4, Bárður Danielsen 3, Borgar Danielsen 2, Terji Poulsen 1, Mortan Hansen 1
**Brotskøst:** H71 4, StÍF 4
**Útvísingar:** H71 6, StÍF 5
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

SÍ-Dráttur 1-3 (25-13, 18-25, 17-25, 16-25):

# Dráttur vann slagið um Vágoynna

**Dráttur vann brakið um Vágoynna ímóti SÍ í meistaradeildini hjá kvinnum. Við sigrinum hava tær tikið eitt stórt fet nærri bronsuheiðursmerkjunum, meðan SÍ tapti eitt týðandi fet í oddastríðnum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um SÍ vann dystin ímóti Drátti, so kundu tær leggja seg eitt stig fram um ÍF í oddinum, og harvið seta seg á oddasessin í meistaradeildini hjá kvinnum. Tað var eisini liðið úr Sørvágu, sum fekk betru byrjanina uppá dystin. Tær spælfu sera gott og fjølbroytt í fyrsta setti, og Dráttur fekk ikki fótin fyri seg í hesum.

Munurin millum liðini bara vaks, og at enda var slett eingin ivi um, at SÍ fór at vinna fyrsta sett. SÍ vann eisini hetta settið 25-13, og sostatt høvdu tær fingið eina dreymabyrjan í týdningarmikla dystinum.

### Dráttur vendi dystinum

Í øðrum setti var tó vent í holuni. Nú vóru kvinnurnar hjá Drátti vaknaðar, og tær løgdu seg eisini á odda tíðliga í hesum settinum. So við og við øktu tær nakað um munin, og hesa leiðslu megnaðu tær at halda allan vegin. Dráttur vann nevniliga annað sett 25-18, og sostatt var aftur javnstøða í.

Í triðja setti var gongdin á leið tann sama, sum í øðrum. Dráttur vann seg aftur nakað fram um SÍ tíðliga í settinum, og spakuliga øktu tær um leiðsluna. Heldur ikki hesaferð hevði SÍ kreftirnar at svara aftur, so Dráttur vann eisini hetta settið 25-17.

### Mistu oddasessin

Dráttur hevði nú rættiliga fingið gongd á sítt spæl nú, og eisini í triðja setti settu tær seg á dystin. Dráttur legði seg á odda mest sum alt fyri eitt, og so við og við gjørdist greitt, at SÍ hevði uppgivið sigurin. Leiðslan hjá Drátti bara vaks og vaks, og henda dagin kundi SÍ einki gera við Drátt. Dráttur vann eisini fjórða sett 25-16, og so høvdu tær tryggjað sær sigurin ímóti grannunum úr Sørvági.

Við sigrinum heldur Dráttur fast um triðja plássið, men nú er munurin upp til oddaliðið bert tvey stig. Tó skal leggjast afturat, at Dráttur hevur spælt ein dyst fleiri.

Hjá SÍ kom ósigurin illa við. Høvdu tær vunnið dystin, so høvdu tær lagt seg á odda í meistaradeildini hjá kvinnum, men nú eru tær enn eitt stig aftanfyri ÍF. Enn sum áður líkist tað tó einum gullbraki, tá júst ÍF er mótstøðuliðið í seinasta dystinum.